# ÍF við kós móti Evropa

**VODAFONEDEILDIN** Fuglfirðingar vunnu trivaligan heimasigur á B71. Møguleikin hjá ÍF at sleppa upp í part í Evropa er góður, og tapið ber við sær, at B71 er nú nærri niðurflytingini

Uni Holm Johannesen

ÍF 3

B71 0

ÍF vann uppiborið 3-0. Eingin ivi um tað.

Øssur Dalbúð, sum er toppskjútti hjá fuglfirðingum, skeyt tvey av málunum, og Bartal Eliasen stóð fyri fyrsta málinum, tá hann umsetti brotsspark til mál.

B71 er nú bara eitt stig framman fyri FC Suðuroy, sum vann fulla úrsøku um vikuskiftið.

Fuglfirðingar, nummar fimm, eru ájavnir við Víking, sum er nummar fýra, á stigatalvuni. Bæði liðini hava 40 stig, og málmunurin hjá Víkingi er +9, og hjá ÍF +8.

Fjórða plássið ber atgongumerkið til evropiskan fótbólt við sær.

Um tað verður Víkingur ella ÍF, sum fer at vinna fjórða plássið, verður ikki minst avgjørt í 27. og seinastu umfarinum, tá grannarnir hittast í Sarpugerði.

Í 26 .umfari fær ÍF vitjan av HB, og Víkingur skal spæla á útivølli móti FC Suðuroy.

## B71 fekk bert eitt stig ímóti ÍF

Um B71 bjargar sær enn eitt kappingarár í vodafonedeildini, so eru tað ikki dystirnir ímóti ÍF, sum hava munað tað stóra í tí roknskapinum. Einasta stigið B71 fekk ímóti ÌF kom, tá liðini møttust í fjórða umfari í Fuglafirði. Rógvi Jacobsen, sum hevur verið ein heldur sjáldsamur gestur í vodafonedeildini í ár, legði ÍF á odda beint fyri steðgin, men tíðliga í seinna hálvleiki syrgdi Símun Hansen fyri, at B71 fekk eitt stig við sær aftur til Sandoyar. Tá liðini hittust í Traðardali á Sandi í trettanda umfari, syrgdu Øssur Dalbúð og Andy Olsen fyri, at ÌF fekk fult. Leygardagin átti Øssur Dalbúð aftur sín stóra leiklut við tveimum málum, tá ÌF vann ein tryggan 3-0 heimasigur á B71.

## *Viðmerkingar í 3. Hálvleiki:*

- *Eli við aftur? Hvar vístu teir dystin? Á History Channel?*
- *Syngja teir hjá EB/Streymi: Omanfyri ElKilund hongur Nordik-steypið.*
- *Hann er fegin, hann er egin, hann er Heðin, fær sær FM beinanvegin.*

## Tveir javnleikir og ein knúsandi sigur

EB/Streymur vitjaði Víking tvær ferðir í Sarpugerði, meðan teir tóku ímóti Víkingi á einum sinni við Margáir. Báðu tær fyrru ferðirnir liðini møttust í landskappingini í ár endaði dysturin við sama úrsliti, nevnliga javnleiki 2-2. Gongdin í báðum javnleikunum var rættiliga meinlík. Tá liðini hittust í Sarpugerði í fjórða umfari, var EB/Streymur á odda 2-0, tá eitt stórt korter restaði av dystinum. Men seinastu løtuna megnaði Víkingur at fáa tvey mál. Søgan endurtók seg við Margáir. EB/Streymur var á odda 2-0 ímóti Víkingi, longu tá ein hálvur tími var leiktur, men í seinna helmingi av seinna hálvleiki skoraði Finnur Justinussen tvær ferðir. EB/Streymur kom aftur á odda 2-0 leygardagin, men hesaferð hildu teir leiðsluna, og útbygdu hana, og fingu soleiðis fimm stig ímóti Víkingi hetta kappingarárið.



*EB/Streymur gjørdi bart í fyrra hálvleiki og skeyt trý mál.*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Klassamunur í Sarpugerði

**VODAFONEDEILDIN** Við einum sannførandi 3-0 sigri á Víkingi, halda sundalagsmenn lív í FM vónini. Sum úrslitið gevur ábendingar um, so var klassamunur á liðunum, har EB/Streymur reelt avgjørdi dystin fyri steðgin. Úrslitið hevur við sær at sundalagsmenn nú eru harðasti kappingarneyti hjá HB á fyrsta plássinum, meðan Víkingur nú má hugsa um at halda fast í fjórða plássinum, sum gevur evropiska luttøku.

Ólavur Øre Hansen

Víkingur 0

EB/Streymur 3

Talan var um ein dyst, har nógv stóð uppá spæl hjá báðum liðunum, men tað vóru gestirnir úr Sundalagnum, sum vóru klárt betra liðið, og vunnu ein sannførandi 3-0 sigur á Víkingi.

Sigurin hevur við sær at sundalagsmenn nú eru á øðrum plássi í stigatalvuni, og eru harvið størsta hóttanin ímóti HB á fyrsta plássi, og sambært venjaranum hjá EB/Streymi, so spæla teir fyri sínum kjansi.

– Tað einasta vit kunnu gera, er at hugsa um okkara dystir. Vit kunnu ikki avgerða FM-heitið sjálvir, og tí er alneyðugt hjá okkum ikki at fokusera uppá hini liðini, men halda fokus á okkara avrik. So má tað bera ella bresta, segði ein vælnøgdur Heðin Askham eftir dystin.

### »Kollektivur offday«

Meðan Sundalagsmenn fegnast um sigurin, so hevur Víkingur nógv at rættað uppá innan næsta dyst. Avrikið hjá Víkingi var als ikki nøktandi, um teir skulu varðveita týdningarmikla fjórða plássið, sum gevur evropiska luttøku.

Áður so trygga Víkinga verjan var ikki til at kenna aftur, og gjørdu vertirnir alt ov nógvar feilir í verjustøðum, meðan tað manglaði hugflog og ferð í álopspartinum. Stutt sagt, so var einki veiggj í felagsliðnum úr Gøtu og Leirvík, sum hevði ein »kollektivan offday«

### Avgjørdu fyri steðgin

Eftir eina varliga byrjan frá báðum liðunum, so vóru tað gestirnir úr Sundalagnum, sum tóku alsamt meira yvir. Við góðum trýstspæli megnaðu grammu gestirnir at seta heldur ótryggu Víkinga verjuna undir trýst.

Ágangandi stílurin hjá EB/Streymi var eisini grungarlagið undir fyrsta málinum, har Pauli G. Hansen var fyrstur á einum returi frá málverjanum, meðan verjan hjá Víkingi ikki kláraði at fylgja við. Løtu seinni var aftur galið hjá vertunum, tá Gudmund Nielsen hegnisliga smekkaði bóltin í kassan til 2-0, eftir gott uppspæl

Fram móti hálvleiksteðginum kundi Sorin Anghel økti til 3-0, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur. Tí Víkingur hevði einki víst, meðan sundalagsmenn vóru skarpir, og kundu havt skorað enn fleiri mál fyri steðgin.

Í seinna hálvleiki royndi Víkingur at leggja trýst á gestirnar, og komu fram til eini tveir líkinda kjansir, sum tó blivu misnýttir. Av tí sama køvdist vónin hjá vertunum sum minuttirnir gingu, og sundalagsmenn vunnu ein sannførandi 3-0 sigur.

## Jógvan Martin Olsen:

# Avrikið ikki nøktandi

– Vit spældu út av lagi vánaligt í móti EB/Streymi. Í verjupartinum geva vit teimum tvey sera bílig mál, har vit standa og sova, meðan teir skora uppá retur frá málverjanum. Somuleiðis mangla vit hegni, neyvleika og heppni í álopspartinum, segði Jógvan Martin Olsen eftir dystin

Samanumtikið metti Jógvan Martin at sigur hjá EB/Streymi var fult uppibornan sigur, tí teir vóru grammari og vildu meira, meðan hansara lið als ikki rakti dagin.

– Vit hava nógv at arbeiða við innan komandi dyst. Tí har skal eitt heilt annað avrik til, um vit skulu varðveita fjórða plássið, segði venjarin hjá Víkingi at enda.